Vikuskiftið Sosialurin






## Barnabók setir fokus á at doyggja

Triðja og seinasta bókin hjá Marjuni Kjelnæs er nú komin. Hvør fjalir seg í smúkkuskríninum? Bókin um Viktoriu og Pinka er sum vant við nógvum myndprýðingum eftir Hanna Bjartalíð. Hon er sera væl egnað at lesa fyri børnum. Omma Viktoriu er á ellisheimi, og ein dagin hoyrir Viktoria nakað, sum fær hana at óttast, at omman er sjúk og skjótt fer at doyggja. Hon og vinkonan Oda gera av, at omman skal hava seinasta ynski sítt uppfylt, men so er bara at vita, hvat omman ynskir sær allarmest í verðini. Omman doyr ikki í hesari søguni, alt var tíbetur ein misskiljing, men umframt at siga eina stuttliga søgu um børn og pinkar, so megnar rithøvundurin eisini væl at lýsa hetta tabuevnið: At doyggja. Í eftirmæli aftast í bókini greiðir pápabeiggin, Anton, frá, hvussu tað kann kennast at missa ein, tú ert góður við.



Sjey dagar í helviti kemur í handlarnar í dag. Á Bókadeild Føroya Lærarafelags vita tey ikki um nakran yngri høvund, enn 15 ára gomlu Rannvá Næs Hoydal, sum einans var 14 ára gomul, tá søgan varð skrivað. So væl dámar teimum bókina, at Bókadeildin er sinnað at geva fleiri bøkur hjá Rannvá út

# Eg skal

**Ein vampýrsøga kemur í dag í bókhandlarnar. Tað er 15 ára gamla Rannvá Næs Hoydal, ið gevur sína fyrstu bók út. Hon gongur langar umvegir úr skúla fyri at finna íblástur, og setir seg á loftið at skriva sínar søgur. Eingin ivi er um hvat hon skal verða. Hon skal verða rithøvundur**

BÓKAÚTGÁVA
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Rannvá Næs Hoydal býr í hugnaligu húsunum í V.U. Hammershaimbsgøtu í Havn. Í einum reyðum gomlum húsum, við kvistum á loftinum, og trøum og spæliplássi í garðinum, lýsa tey av heimligheit, nostalgi og hugna.

15 ára gamla Rannvá sær sjálv út sum ein fitt og pen genta. Hon er blíð og hevur eitt sera søtt og vinarligt andlit. At tað ikki endurspeglar tað, henni dámar best at skriva um, kunnu vit sláa fast við sjeytumma seymi. Tí í dag kemur hennara fyrsta bók út, og hon er ikki á nakran hátt sjálvbiogafisk. Hon snýr seg um ein drong, sum leggur til merkis, at alt við honum ikki ruggar rætt. Hann hevur fingið smakk fyri blóði, sum noyðir hann at eta av sínum egnu. Teitur er ein vampýrur. Í Sjey dagar í helviti, fylgja vit honum, og síggja hvussu hann snýr seg úr trupulleikunum, sum stinga seg upp, tá onnur varnast at okkurt er galið.

### Revar vorðnir til vampýrar

- Eg havi bara hug til at finna uppá, og so at deila tað við øðrum, sigur Rannvá Næs Hoydal um sítt høvundavirksemi.

Heima hava tey altíð lisið nógv við børnunum, og síðan Rannvá gjørdist so stór, at hon kundi lesa sjálv, hevur hon lisið eitt ótal av bókum úr fantasy sjangruni. Harry Potter fyrst og fremst, síðan bøkurnar um Skammaradóttrina, Artemis Fowl og Myrkursins Frumevni. Í løtuni er tað stóra breyðið av eini bók, ið liggur á náttborðinum, Twilight. Tað er enn ein bók úr fantasy sjangruni eftir høvundan, Stephanie Meyer.

- Mær dámar væl tað yvirnáttúrliga. Sum barn dámdi mær væl at skriva og tekna um djór, eg helt tað vera stuttligt at skriva søgur um djór, sum tosaðu. Eg plagdi eisini at spæla Lion King her í garðinum hjá okkum, sigur hon og smílist.

Mamman tekur orðið eina løtu, og greiðir frá skrivingini hjá Rannvá.

- Eg dugi væl at síggja, hvussu hon hevur ment seg nú. Fyrst skrivaði hon um revar, so úlvar, varúlvar og nú er tað so vampýrar, hon skrivar um, greiðir mamman frá.

Mamman lesur alt, sum Rannvá skrivar.

- Eg má siga, at eg gjørdist nakað kløkk, tá eg sá hvat hon skrivaði um, sigur hon flennandi.

### Einki ð manglar

Mamman, Marianna Hoydal, er lærari. Hon hyggur alt í gjøgnum, sum Rannvá skrivar. Hon kann bara staðfesta, at har manglar einki ð í tekstunum hjá Rannvá.

- Hon hevur altíð lagt seg eftir at skriva væl føroyskt.

Umframt góða málið,